


www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 01 - 2013

# Norsku reiðararnir í øðini um oljuætlanir

Norsku fiskiskipareiðararnir eru í øðini inn á stjórnina, tí hon vil loyva oljufeløgum at leita eftir olju og gassi í Barentshavinum, og tað hevur ikki bøtt um hýrin, at Arbeiðaraflokkurin nú er farin at tosa um at loyva oljuvirksemi úti fyri Lofoten, Vesterålen og Nordland. -Stjórnin og Arbeiðaraflokkurin spæla við eitt fiskatilfeingi, sum er eitt av teimum størstu í heiminum, og hetta er eisini skaðiligt fyri tað reina havið og fyri norska ferðavinnu, sigur stjórin í reiðarafelagnum Fiskebåt, Audun Maråk, við norska kringvarpið NRK. Hann sigur, at tað er púra burturvið at lata hesar leiðirnar upp fyri oljuvinnu. Bæði Barentshavið og leiðirnar úti fyri Norðurnoregi eru gýtingarleiðir hjá týðandi fiskasløgum, og alt hetta kemur í vanda, um oljuvinna verður loyvd har, sigur reiðarastjórin. Í Fiskebåt eru tey til reiðar at stríðast ímóti ætlanini hjá Arbeiðaraflokkinum at økja oljuvirksemið á teimum norðaru havleiðunum. Audun Maråk vísir á, at Havrannsóknarstovan hevur eisini ávarað ímóti oljuvirksemi á leiðunum. Norsku umhvørvisverndarfelagsskapirnir finnast eisini hvassliga at Arbeiðaraflokkinum, tí hann nú tosar um at loyva oljuvinnu við Lofoten.